# Bygdarráðsfundur – stytt gerðabók

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 15.02.2021 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Ronni Hammer
Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen
Niels Olaf Eyvindsson
Thorstein Thomsen
Sten Spange Larsen (fyri Martin í Nesi)

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Góðkenning av roknskapi 2020 hjá Hvalbiar skúlabókasavni.**
   Roknskapurin hjá bókasavninum fyri 2020 javnvigar við kr. 42.964,00.
   **Trivnaðarnevndin 11.02.2021:**
   Nevndin hevur góðkent og undirskrivað roknskapin.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at góðkenna roknskapin hjá Hvalbiar skúlabókasavni 2020.

2. **Grannskoðanarprotokoll um ábyrgdarbýtið – Hvalbiar Kommuna.**
   Grannskoðanarprotokoll um ábyrgdarbýtið av roknskaparframløguni, vavið og endamálið við grannskoðanini.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at góðkenna grannskoðanarprotokollina.

3. **Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 213a, Hvalba.**
   Søkt verður um loyvi at byggja bilhús á Bíarvegi 98, Hvalba.
   **Tekniska nevnd 08.02.2021:**
   Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá byggimálsviðgeranum.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at geva byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 213a sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum.

4. **Umsókn um byggiloyvi til garð á matr. nr. 524f, Hvalba.**
   Umsókn um loyvi at stoypa garð og tún á Snæbjarnarvegi 6, Hvalba. Garðurin verður stoyptur framvið kommunalum vegi.

**Tekniska nevnd 08.02.2021:**
Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá byggimálsviðgeranum.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at geva byggiloyvi til garð og tún á matr. nr. 524f sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum.

5. **Umsókn um byggiloyvi til trafostøð á matr. nr. 3a, Hvalba – marknaumskipan.**
Ætlanin er at taka verandi trafostøð nr. 506 á matr. nr. 390f niður og byggja nýggja á matr. nr. 3a, Hvalba.
Hvalbiar Kommuna søkir í hesum sambandi um marknaumskipan millum matr. nr. 3a og 390a, Hvalba.
**Tekniska nevnd 08.02.2021:**
Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá byggimálsviðgeranum.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi til nýggja trafostøð á matr. nr. 3a, treytað av, at frámatrikuleringin er góðkend og at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi frá JCJ ArcCon og BK17.
Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan.

6. **Umsókn um byggiloyvi til skúr á matr. nr. 529 í Rókhaga:**
Søkt verður um loyvi at seta upp størri skúr í sunnasta parti av Rókhaga, matr. nr. 529a.
**Tekniska nevnd 08.02.2021**:
Nevndin mælir til at fylgja úrskurðinum hjá Yvirfriðingarnevndini.
**Avgerð:**
Víst verður til fyrr givið byggiloyvi til skúr og mastur frá 12.11.2020. Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi til størri skúr sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum.

7. **Byggisamtyktin – broytingar á kortum:**
Uppskot til broytingar á kortunum eru:
Matr. nr. 462a og 513 í Sandvík - broytast til havnarøki
Miðstaðaøki – broytast til miðstaða(r)øki
**Tekniska nevnd 08.02.2021:**
Nevndin mælir til, at matr. nr. 462a og 513 í Sandvík verða broytt til havnarøki. Matr. nr. 3a, 390f, 218a og 128a á Hamranesi verða broytt til vinnuøki, eins og matr. nr. 525b á Skalla verður broytt til vinnuøki. Miðstaðaøki verður broytt til miðstaða(r)øki
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá nevndini og harumframt broyta matr. nr. 434g í Sandvík til P-bilstøðlar.

**8. <u>Innkomið tilboð frá Articon uppá betongdekk og stuðlamúr</u>.**

Tilboð betongdekk vestanfyri flakavirkið: kr. 260.000,00 uttan MVG

Tilboð stuðlamúr og meirveiting betongdekk: kr. 647.000,00 uttan MVG

**Vega- og havnanevndin 09.02.2021:**

Nevndin mælir til at taka av tilboðnum uppá betongdekk vestanfyri flakavirkið kr. 260.000,00.

**Fíggjarnevndin 15.02.2021:**

Nevndin hevur sama tilmæli sum Vega- og havnanevndin.

**<u>Avgerð</u>:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

**9. <u>Vetrarhald í sóknini</u>:**

Hvalbiar Kommuna hevur avtalu við Landsverk um vetrarhald í sóknini. Henda umfatar bert Norðbergsvegin, oman á Hamranes, Heiðagøtu og Klettagøtu í Sandvík.

**Vega- og havnanevndin 09.02.2021**:

Forkvinnan í nevndini hevur heitt á BKE um at salta vegirnar í sóknini. Nevndin mælir til, at BKE ger hetta arbeiði veturin/várið 2021 og kemur við einum tilmæli til komandi vetur.

**<u>Avgerð</u>:**

Einmælt samtykt.

**10. <u>Ansingargjøld á dagstovninum</u>.**

Uppskot frá Thorstein Thomsen um, at ansingargjaldið fyri 3. barnið í somu familju verður ókeypis.

**Trivnaðarnevndin 11.02.2021**:

Nevndin tekur undir við uppskotinum um ókeypis ansingargjald fyri 3. barnið.

**Fíggjarnevndin 15.02.2021**:

Samtykt varð einmælt at taka undir við hesum uppskoti.

**<u>Avgerð</u>:**

Einmælt samtykt.

**11. <u>Innkomið tilboð uppá rógvimaskinu</u>.**

Tilboð frá Burn Fitness uppá Concept ll rógvimaskinu kr. 10.980,00 uttan MVG.

**Trivnaðarnevndin 11.02.2021:**

Nevndin mælir til at seta pening av til hetta í 2022.

**Fíggjarnevndin 15.02.2021:**

Niels Olaf Eyvindsson og Martin í Nesi mæla til at keypa tvær rógvimaskinur. Janus Thomsen mælir til ikki at taka av hesum tilboði.

**<u>Avgerð</u>:**

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini og seta pening av til hetta á komandi fíggjarlóg.

**12. <u>Reglugerð fyri nýggja bátahylin</u>.**

Uppskot um broyting er:
Uppskot 1: at gjøldini verða eins fyri allar bátaeigarar
Uppskot 2: at gjøldini hjá bátaeigarum av bygd verða 25% hægri
Uppskot um gjald fyri pláss í bátahylinum:
Bólkur 1: kr. 1.100 v/MVG
Bólkur 2: kr. 1.600 v/MVG
Bólkur 3: kr. 2.200 v/MVG
Bólkur 4: kr. 2.700 v/MVG
Bólkur 5: kr. 3.200 v/MVG
Bólkur 6: kr. 3.800 v/MVG

**Vega- og havnanevndin 09.02.2021:**
Nevndin mælir til at taka undir við hesum broytingaruppskoti, við gildi frá sept. 2021.

**Fíggjarnevndin 15.02.2021:**
Nevndin mælir til at taka undir við uppskotinum um gjald. Janus og Martin mæla til, at gjaldið hjá avbygdafólki verður 25% hægri, meðan Niels Olaf mælir til, at gjaldið hjá avbygdafólki verður 50% hægri. Nevndin mælir til ikki at hava mánaðargjøld.

**<u>Avgerð</u>:**
Atkvøtt varð fyrst fyri uppskotinum um at gjaldið verður lækkað við 10%, gjaldið fyri avbygdafólk verður 25% hægri og mánaðargjaldið verður strikað. Samtykt við 4 atkvøðum fyri. Gunnhild, Niels Olaf og Sten tóku ikki undir við hesum.

**13. <u>Kunning</u>.**

**14. <u>Ikki almenn mál</u>.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.30

Janus Thomsen Ronni Hammer Eir J. Norðberg Niels Olaf Eyvindsson

Gunnhild Mortensen Thorstein Thomsen Sten Spange Larsen